## DAGSINS MEINING

# Vunnu tí tey brúka høvdið

Eitt av teimum stóru vinnutiltøkunum her á landi varð hildið í Norðurlandahúsinum fríggjadagin. Undir heitinum "Vinnudagurin 2005 Hvat hendir?" varð stílað fyri áhugaverdari skrá við luttøku av umboðum fyri bæði íslendska, norska og danska vinnulívið. Her fingu tey mongu hundrað umboðini fyri føroyskt vinnulív eina sera góða uppliving – frá at hoyra um alheimsgerð við eitt nú donskum og íslendskum brillum til at uppliva ársins virki. Har danir meta seg fáa nakað skilagott burtur úr eisini, tá virki flyta sínar framleiðslur til onnur lond, og har íslendingar meta seg fáa nógv burtur úr, tá peningastovnar og íleggjarar spjaða sínar íløgur til nógv onnur lond. Har varð eisini røtt um privatisering. Um hvat føroyingar kunnu læra av eitt nú gongdini í Íslandi. Rættiliga avgjørdu niðurstøðurnar hjá nevndarformanninum í íslendska Landsbankanum um eitt nú privatisering av almennum føroyskum fyritøkum munnu hava givið fólki nógv at hugsa um. Vinnuhúsið hevur so við slíkum fyrilestri á Vinnudegnum gjørt sítt til at fáa gongd á tjakið um at einskilja fyritøkur her heima.

Men hæddarpunktið á Vinnudegnum var at kjósa ársins virki og lata heiðursprógv fyri serligt átak. Og væl varð valt og rakt. Hóast Pipar og Salt vóru við á Vinnudegnum og á sín skemtiliga og speirekandi hátt gjørdu gjøldur burtur úr altumfevnandi føroyska fiskamentalitetinum, so vóru tað kortini tvey fiskavirki, sum gjørdust vinnarar, tó ikki vanlig fiskavirki soleiðis sum vit kenna tey frá gerandisdegnum. Talan var um virki, sum hvørt á sínum øki, hugsa ótraditionelt og royna nýggjar leiðir.

Ein kann av røttum siga, at tey í Lorvík brúka høvdið. Hava vit og skil til at finna uppá men eisini evnini til at gera hugskot til veruleika. At Høvdavirkið í Lorvík gjørdist ársins virki er eitt plettskot. Tað vísir ikki bert, at hesi góðu fólk hava havt dirvi og treiskni til at fáa tað við at bera til. Tað vísir eisini, at tey hava megnað at liva upp til tíðarandan, sum m.a. er at fáa sum mest burtur úr allari rávøruni. At troyta tilfeingið skilagott. At hava bygt upp vinnu, sum ger dýra útflutningsvøru burtur úr fiskahøvdum, ið fyrr vóru tveitt burt ella brúkt til bíliga djórafóðri, er einki minni enn eitt bragd. Væl vitandi, at nógvir aðrir eisini hava gingið undan at brúka sum mest av fiskinum, so er hetta stigið at turka høvdini og útflyta tey til Afrika, nakað heilt serligt. Tí ikki bert brúkar tú avlopið frá fiskaframleiðslu, tú brúkar eisini avlopshita frá grannanum til framleiðsluna. Eisini umhvørvi fær sín ágóða. Harvið troytir tú tilfeingið á skynsamasta hátt. Tit vunnu tí tit brúka høvdið. Tillukku.

Heiðurin fyri serligt átak varð latið Fariga, sum herfyri tók tað heldur óvanliga men eisini djarva stigið at fara undir fiskaframleiðslu í einum av baltisku londunum. Hetta er so partur av alheimgerðini, og hvussu gjarna vit vilja tað ella ikki, so eru eisini vit noydd til at fylgja hesi gongd. Hetta er so eisini í tráð við tað formaðurin fyri Dansk Industri segði í sínum fyrilestri: at henda gongdin kann eisini hava nógvar fyrimunir fyri heimaídnaðin. Tí við at fara út í heim við framleiðslu leggur tú í veruleikanum eisini nakað eftir heima hjá tær sjálvum. Latið okkum vera við og lat okkum gera tað miðvíst. Vinnuhúsið eigur rós uppiborið fyri gott tiltak. Tillukku til kovboy fólkini fyri dygdargott filmsarbeiði.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Millumbylgjusendarin

**Skal føroyskt á 531 kHz gerast søga, so at vit bert hoyra týskan alputóleik á 531 kHz.**

Nú frættist, fyrst í ÚF og síðani á Rás 2, at ætlanin er at keypa ein nýggjan millumbylgju sendara at seta upp á Akrabergi.

Men hesin nýggi sendarin skal bert kunna senda við 25 kW, hetta er alt ov lítið.

Tað er helst einki at ivast í, at um vit minka sendiorkuna úr 200 kW niður 25 kW, so verður tað ikki bara í bakgrundini at vit koma at hoyra týskan alputónleik, so fer harmonikan helst at doyva føroyingin púrasta.

Í frágreiðingini um útvarps- og sjónvarpssendinetið frá mars 2005 stendur, at tað eru bert 550 fiskimenn, sum fáa nyttu av millumbylgjusendaranum. Einki verður sagt um manningarnar, ið sigla við handilsskipum og fremmandum skipum. Tað sigla sum kunnugt nógvir føroyingar við hesum skipum, og rættiliga fitt av teimum sigla í Norður Evropa, hesar manningar fáa tískil eisini gleði av núverandi sendara.

Vit eru ikki so kræsnir. Tað kann gott skróva eitt sindur í hátalaranum, bara vit fáa tað við, ið sagt verður, so eru vit nøgdir.

At útisetar og sjófólk verða flokkað saman í hesi frágreiðing, er rættiliga løgi. Vit hava als ikki somu fortreytir. Útisetar eru, sum oftast, búsitandi á landi við teimum fyrimunum tað gevur. Sjófólk hava sjáldan samband við land.

Í somu frágreiðing stendur eisini, at í dag kunnu sjófólk í stóran mun fylgja við á ÚF-netvarpinum alt samdøgrið.

Tað er okkum kunnugt bert tvey føroysk skip, ið hava alnet samband, ið ger tað møguligt at hoyra ÚF beinleiðis á netinum, og tað eru Skálaberg og Norrøna. Av útlendskum skipum eru tað bert nøkur fá special skip, ið hava slíkt, og tey hava tað einans tí, at tann ið leigar skipið krevur tað. Tá leigumálið er av, er alnet ævintýrið eisini av hjá teimum.

Tað kostar hópin av peningi at reika á netinum um fylgisvein, so nógv flestu útgerðarmenn fáa marruna av tí.

Tað mest vanliga er, at tú hevur møguleika at senda og taka í móti telduposti, og so heldur ikki meir.

Nógv útgerðarfeløg hava eitt filtur, ið avmarkar, hvussu stórt eitt teldubræv kann vera, hetta fyri at hava tamarhald á útreiðslunum.

Tann einasti møguleikin hjá øllum teimum, ið ikki sigla við Skálaberg, Norrønu ella einum av teimum fáu útlendsku specialskipunum at fáa tíðindi er sostat frá Sosialinum. Internet Sosialurin er tó so stórur at nógvir ikki kunnu taka hann niður.

ÚF sendir eingi daglig tíðindi út sum t-post, sjálvt um teir hava fingið áheitanir um hetta.

Nøkur donsk skip fáa hvønn dag eina rúgvu av tíðindum frá DR, á skrift, sum teldupost, men frá ÚF fast einki.

Vit vilja ráa teimum, ið skulu taka avgerðina í hesum máli, til at keypa ein nýggjan 200 kW sendara.

Tá so hesin 200kW sendarin er útslitin, um eini 15 ár, er tøknin helst komin so langt, at vit kunnu lurta eftir ÚF-netvarpinnum.

Kanska kann tann gamli sendarin umvælast um tað er ódýrari.

Vónandi verður tað fíggjarliga møguligt ein dag at lurta á netinum, men í løtuni er tað alt ov dýrt, so tað ganga helst nógv ár, áðrenn tað verður møguligt. Í sjóvinnuni verður hvørt oyra vent fleiri ferðir.

Tú kann spyrja teg sjálvan, hvar manningarfeløgini eru í øllum hesum, tað er løgið at einki hoyrist frá teimum. Tað eru jú eisini teirra limir ið missa møguleikan at hoyra ÚF.

**Eyðun Simonsen**
**Hoyvík**

**Høgni Petersen**
**Rituvík**

**Rógvi Thorsteinsson**
**Vágur**

**Rói Lindberg**
**Tórshavn**

**Rúni Simonsen**
**Hoyvík**

**Jón Simonsen**
**Tórshavn**

**Niels Poul Holm**
**Tórshavn**

**Gunnar Johansen**
**Hoyvík**

**Jónsvein Berg**
**Hoyvík**

# Ger arbeiðið ordiligt, Uni

**Ottar í Funningsstovu**

So prógvaði hann tað enn einaferð, sjálvskrivaða tónleikaflogvitið á Dimmu, Uni L. Hansen, at hann ikki ger sítt arbeiði til lítar.

Í grein í Dimmalætting mánakvøldið 20. september ummælir geniið av Skálafjørðinum útgávukonsertina hjá Páll Finnur Páll á Rex herfyri, har undirritaði var DJ ella plátuvendari, sum tað eisini eitur. Hóast endamálið við vitjanini hjá Una á Rex var fyrst og fremst at ummæla konsertina hjá PFP, so nýtir hann helmingin av sínari ógvuliga tunnu grein til at niðurgera undirritaða.

Uni sigur í greinini, at eg eri sum ein skøvað pláta, sum ikki dugir at diska upp við nøkrum øðrum enn rokkballadum frá 80'unum og 90'unum, og at tað er deprimerandi, tá ið eg leggi plátur á.

Men Uni, her prógvar tú enn einaferð, at tú ikki gert títt arbeiði til lítar. Tí flestøll tíðindafólk við virðing fyri sær sjálvum høvdu fyrireikað seg til eina slíka uppgávu fyri at vita, hvat hon gekk út uppá. Um tú hevði gjørt tað, so visti tú eisini, at talan var um eitt sonevnt »80'ara kvøld«, har mín uppgáva var fyrst og fremst at spæla góðan tónleik frá 80'unum, og tí kunnu vit bert staðfesta, at eg, í mun til teg, gjørdi mítt arbeiði til fulnar. Men OK, tú ert jú ikki útbúgvin tíðindamaður, so tað er kanska ein umbering fyri jánkasligu greinina hjá tær.

Eg dugi ikki at skilja, at leiðslan á Dimmalætting kann liva við, at eitt blaðfólk hjá teimum í so grovan mun í sambandi við eitt ummæli sleppur at niðurgera ein einstakan persón, sum í veruleikanum bert gjørdi sítt arbeiði. Sama blaðfólk hevur ivaleyst bæði fingið yvirtíð og hvat veit eg fyri at sita á Rex, Gud viti í hvørjum tilstandi, í nakrar tímar fyri at ummæla eina konsert. Úrslitið av krevjandi arbeiðsuppgávuni hjá sjálvskrivaða tónleikaflogvitinum eru umleið 15 reglur um konsertina hjá PFP, har í veruleikanum einki verður sagt um tónleikin hjá bólkinum, og so nakað tað sama tali av reglum, har eg verði niðurgjørdur.

Til eina aðru ferð, Uni, ger so arbeiðið hjá tær ordiligt ella lat verða.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.